# íðindi

## STÓR SKRÝMSL GRÁTA IKKI




*Barnabók 3-6 ár*
*RakelHelmsdal og Kalle Güettler*
*Áslaug Jónsdóttir myndprýddi*
*Bókadeild Føroya Lærarafelags*
*30 blaðsíður*
*110 krónur*

Onnur bókini um skrímslini. Stóra skrímsl er øvundsjúkt inn á lítla skrímsl, tí lítla skrímsl dugir alt betur. Hvat skal stóra skrímsl gera, tí stór skrímsl eiga ikki at gráta!

## IMAGES OF FISHERMEN

*Dokumentar*
*Maria Olsen*
*Forlagið GlobalOne Press í Aberdeen*
*Blaðsíður 388 við 200 litmyndum.*
*545 krónur*




Ein nýggj myndabók eftir Mariu Olsen fotograf kemur í hesum døgum út í Føroyum, Stóra Bretlandi og aðrastaðni. Bókin, ið ber heiti "Images of Fishermen", inniheldur seks stórar myndafrásagnir frá fiskitúrum við føroyskum, hetlendskum, íslendskum og grønlendskum skipum.

Hetta er fyrstu ferð at nøkur myndabók so gjølla og umfatandi lýsir sjólív og fiskiskap í Norður Atlantshavi. Talan er um ymiskar veiðihættir og ymisk fiskasløg, og endamálið er ikki minst at lýsa fiskimenn og teirra arbeiðsumhvørvi, sigur Maria Olsen.

Búi Tyril hevur skrivað tekstir til myndafrásagnirnar. Bókin, sum er skrivað á enskum máli, inniheldur harafturat eina frágreiðing eftir heimskenda fiskivinnu serfrøðingin Menakhem Ben-Yami um fiskivinnumál, við serligum atliti til ta føroysku fiskidagaskipanina.

## HVAT HEVÐI MUNCH VERIÐ UTTAN DUPULTKVARTETTINA Í EBENEZER




*Yrkingar*
*Tóroddur Poulsen*
*Myndprýdd av høvundanum.*
*Mentunargrunnur Studentafelagsins*
*116 blaðsíður*
*190 krónur*

Hetta vakra yrkingasavn er myndprýtt við grafikki eftir høvundanum, sum sær sjálvum líkur gløgt spælir við orðum og týdningum. Hann hugsar um teir góðu gomlu dagarnar, tá ið myrkrið fjaraði burtur, tá ið tað lýsti, og spyr, um hann sjálvur og skuggin hava skift um pláss. Hóast dámurin mangan er skemtiligur, so er deyðin tíðum í nánd, men roynt verður at halda hann burturi við poetiskum gerandislýsingum, og tú hugsar um William Heinesen, Heðin Brú og Dan Turèll sum allir søgdu, at tú mást ikki lítilsmeta gerandisdagin. Tær óunniligu lýsingarnar stinga seg kortini fram og følast sum gravsteinar í skónum. Loksins er niðurstøðan, at tað ger einki at kirkjan er tóm, tí onkuntíð blunkar ein stjørna uppi undir loftinum.

## TRAÐKAÐU FÓLKINUM SLÓÐ

*Søga*
*Finnur Johansen*
*Egið Forlag 2006*
*170 blaðsíður*
*270 krónur*




Myndirnar í bókini vísa Havnina seinnapartin av næstseinastu øld.

Í bókini eru um 140 fotomyndir, ið eru tiknar frá umleið 1860 til 1900. Tær eru tíðarfestar so neyvt sum tað hevur borist, sagt er frá, hvat ið sæst á hvørjari mynd, sethús, úthús, skip og nøvnini á fólk, vit kenna, umframt staðarnøvn.

## ZISKATRØÐBREKKAN

*Søga*
*Christoffer Jensen*
*Egið Forlag 2006*
*282 blaðsíður*
*240 krónur*




Hvussu var tað at vaksa upp á størri bygd í 1950-unum. Tað er klaksvíkingurin, sum fortelur frá hesi turbulentu broytingartíðini við politiskari frustrasjón, sosialari ónøgd, arbeiðsloysi og læknastríði, soleiðis sum hann sjálvur upplivdi hetta tíggjuára skeiðið.